# Eg ella Vit

**Í strategiskum høpi eru tvey sjónarmið í sambandi við sjálva kjarnuna í eini strategi - hvørji eru "vit", sum seta okkum nøkur mál?**

VINNUKRONIKKUR
*Signar P. Heinesen*



Sambært tí eina sjónarmiðinum, tí eina "skúlanum", er eitt átak - ein strategi, ein ætlan - eitt felags átak, har ymisk áhugamál geva sítt íkast og kunnu rokna við at fáa sína úrtøku. Við einum fremmandum orði verður hetta nevnt "stakeholder view" (sjónarmið hjá ymsum áhugamál-um). Ein eigari, ein medarbeiðari, ein stjóri, ein veitari og ein keypari eru allir "stakeholders" - allir hava áhuga - í eini fyritøku og eingin teirra hevur einarætt uppá fyritøkuna. Hvør gevur sítt íkast og fær sítt avkast, um tað er løn, vinning, marknað, vøru, politiskt álit ella annað. Høvuðsuppgávan hjá einum leiðara sambært hesum sjónarmiði er at røkja fjøltáttað áhugamál. Høvuðsspurningurin í einhvørjum máli er, hvør loysn tænir flestu áhugamálum best og ger minst skaða fyri fægst møgulig.

Sambært hinum "skúlanum" er eitt átak - ein strategi, ein ætlan - eitt "maktspæl". Tann og tey, sum hava formliga makt (eigarar, stjórar o.o.), trýsta eina ætlan fram og berja niður alla mótstøðu móti hesi ætlan. Á fremmandum máli verður hendan læran stundum nevnd "shareholder view" (sjónarmið at eigarin eigur og ræður). Høvuðsuppgávan hjá einum stjóra sambært hesum sjónarmiði er at økja um avkastið hjá eigarunum. Høvuðsspurningurin í einhvørjum máli er, hvør hevur maktina.

Har annar "skúlin" - onnur læran - tilskundar fólkum at røkja ymisk áhugamál í sambandi við eitt átak og eina strategi, tilskundar hin læran fólkum at finna frægasta mátan at seta navn á mótstøðu og berja hesa mótstøðu niður. Har onnur læran tilskundar at finna frægastu orkuna í einhvørjum menniskja og einhvørjum høvi, tilskundar hin læran at niðurbróta og sundurskilja.

Á føroyskum kunnu vit brúka heitið leiðslulæran um "stakeholder view" og maktlæran um "shareholder view".

### Inntøkujavni

Fólk hava verið rættiliga ymisk á máli um, hvat sjónarmið tænir samfelagnum best og serliga eru tað liberalu sjónarmiðini og sosialdemokratisku sjónarmiðini, sum á okkara leiðum hava skilt vøtnini. Spurningurin er komin á breddan í donsku fjølmiðlunum, nú tað vísir seg, at Anders Fog Rasmussen tykist hava broytt meining og als ikki stendur so fast uppá tað, sum hann annars royndi í bók síni um minimalstatin. Sosialdemokratarnir hava eisini broytt sín politikk og eru nú eins liberalir og høgraflokkarnir. Báðir partar tykjast arbeiða við spurninginum um at finna nýggj politisk mørk í nýggja veruleikanum.

Listin, sum vísir, hvussu jøvn inntøkan í samfelagnum er samansett í ymsu londunum, er helst ein orsøk til, at fólk gerast alt samdari um, hvat tænir bæði tí einstaka og samfelagnum sum heild best. Øll mát hava eina óvissu og í so truplum mátum, sum inntøkujavna, er óvissan so stór, at lítil meining er í at tosa um, hvør er fremst og hvør er á øðrum plássi. Men tey fýra skandinavisku londini, Danmark, Noreg, Svøríki og Finland eru øll millum tey 10 londini, við javnastu inntøkunum. Tey 10 londini við mest ójavna eru: Colombia, Paraguay, Suður Afrika, Brasilia, Guatemala, Swaziland, Miðafrikanska Lýðveldið, Sierra Leone, Botswana, Lesotho og Namibia. Av teimum 124 londunum á hesum listanum, stendur USA sum tað seinasta ríka vesturlendska landið, sum nummar 74. Og tað stendur rættiliga einsamalt har niðri á listanum, aftaná Jordan, Azerbaijan, Nepal, Georgia, Moldova, Vietnam, Laos, Estonia, Armenia, Jamaica, Tanzania, Portugal, Mauretania, Morocco, Mozambique, Tunisia, Turkaland, Trinidad/Tobago, Guinea og Cambodia. Øll hini ríku londini eru millum tey ovastu 53 á listanum.

Ábendingin er ikki til at fara skeiv av. Tey ríku londini hava eina rímiliga javnvág millum rík og fátæk fólk.

### Styrkiroyndir í gamlari tíð

Flestu søgufólk munnu vera samd um, at ein tann ríkasta mentanin, sum higartil hevur livað í heimssøguni, var hon í gamla Grikkalandi - serliga gamla Athen í tíðini umleið eitt hálvt ártúsund undan okkara tíðarrokning. Mentanin hetta hálva ártúsundið var vøggan hjá filosoffum sum Sokrates, Platon og Aristoteles. Hon var vøggan hjá statsmanninum Perikles og søgumanninum Herodot. Her gingu matematikarin Pythagoras og rithøvundurin Sofokles sínar barnaskógvar - fyri at nevna nakrar. Tann elsti av hesum var føddur í 570 f.Kr. og tann yngsti 384 f.Kr.

Hóast gerandisdagurin í Athen hesi árini var eyðkendur við kríggi, er ikki nógv, sum bendir á, at kríggj hevði teirra stóra áhuga. Tað var ein neyðugur partur. Men grikkar eru eisini kendir fyri síni krígskynstur.

Slagið við Marathon í 490 f.Kr., har um 20.000 persiskir hermenn taptu ímóti um 10.000 grikkum og mistu um 6.400 menn, meðan um 200 grikkar doyðu, sigur nakað um, hvussu nógv grikkar fingu burturúr sínum fólki. Seinni sendi persiski kongurin Darios ein av bestu herhøvdingum sínum, Xerxes, við 100-150.000 hermonnum (ella meir) og 1200 herskipum, umframt flutningsskipum, til Grikkalands. Grikkar møttu fyrst Xerxes í tronganum við Thermopylai við um 8.000 monnum og hildu teimum í tríggjar dagar inntil svíkurin Ephialtes vísti persum vegin afturum hendan trongan. Teir 7.000 grikkarnir fluttu seg undan og ein lítil herur við um 1000 monnum bardist í tronganum og tað kostaði um 20.000 persum lívið. Flotin hjá Xerxes skuldi nú berja niður griksku mótstøðuna við oynna Salamis. Um 700 persisk herskip møttu har um 300 griksku skipum, men tá ið persar høvdu mist um 200 skip máttu teir venda við. Grikkar mistu um 40 skip.

Makedónin Alexandur tann Stóri verður viðhvørt roknaður sum tann fyrsti, sum royndi at leggja lunnar undir eitt meira skipað samskifti millum ymisku fólkasløgini. Í árunum 334 til 323 f.Kr. førdi Alexandur tann Stóri sínar um 50.000 hermenn ígjøgnum alt lítla Asia, yvir til Egyptalands og eystur til India. Á leiðini møtti hann persiska herinum í fleiri umførum. Bardagin við Gaugamela 331 f.Kr er helst tann mest avgerandi í røðini. Har møttu hesir 50.000 makedónarnir tí fólkaríka herinum hjá persarakonginum Darios. Hvussu nógvir persiskir hermenn vóru, eru søgufrøðingar ymsir á máli um. Onkur nevnir 250-300.000 og aðrir upp til eina millión. Hvussu er og ikki, var talið mangar ferðir størri enn teir hálvthundrað túsund makedónarnir. Men hesir hálvt hundrað túsund vunnu og mistu bert um 100 menn, meðan talið av falnum persum er eins óvíst og talið á teimum, sum vóru við í krígnum. Í bókini "Alexander 334-323 BC - Conquest of the Persian Empire", 1991, verður sagt, at ein millión persiskir hermenn vóru í bardaganum og 300.000 teirra fullu.

Vit kunnu spyrja, hvør munurin var millum grikkar og persar. Vit kunnu spyrja, hvussu tað kann vera, at júst hendan mentanin í gamla grikkalandi um hetta mundið fyri okkara tíðarrokning fekk so nógv burturúr sínum fólki. Vit kunnu helst svara ymiskt, men ein tulking er, at tann athenska demokratiska skipanin frá 594 til 322 f.Kr. (um vit rokna broytingarnar hjá Solon við) í fyrsta lagi er einasta veruliga demokratiska skipanin, sum nakað fólk í heiminum higartil hevur skipað seg eftir - fyri tey, sum fingu lut í henni, t.e. fyri frælsar menn. Havast skal í huga, at tann athenska demokratiska skipanin var ikki umboðandi, men beinleiðis. Teir, sum skuldu útinna avgerðir í verki, vóru valdir á hvørjum ári og teir, sum høvdu makt (orðstýrarar o.a.), vóru valdir við lutakasti fyri ein dag í senn. Í øðrum lagi, er hetta longsta tíðarskeið higartil við demokratiskum íkasti, um vit rokna vesturlendsku demokratisku skipanirnar frá seinast í seytjanhundrað talinum (USA og Frakland) til dagin í dag uppí.

### Føroyar - ein búskaparlig humlabi

Eftir hesum tulkingum er ein inntøkujavni og eitt víðfevnt demokratiskt prinsipp tað sterkasta amboðið, sum eitt samfelag kann skipa seg eftir. Hóast ein slík tulking er ógvuliga breið, ber tó til at skyna á gongdum og ógongdum leiðum í ymsum viðurskiftum.

Hyggja vit nøkur tíggjutals ár ella longur aftur í føroysku søguna, ber kanska til at fáa eina frágreiðing til, hví føroyska fólkið ikki, eins og nógvar aðrar lítlar tjóðir, duttu niðurímillum í framgongdini síðani ídnaðarkollveltingina. Hóast yrkjarin sigur, at "saman at halda, var ei okkum givið", bendir tó okkurt á, at júst hetta samanhald var okkum givið. Og øvugt av, hvat Hans Andrias Djurhuus í sanginum "Ljós yvir landið" meinti, er komið væl burturúr. Bæði búskaparliga og mentunarliga. Hóast royndirnar aðrastaðni í heimi benda á, at tað hevur verið trupult hjá smáum mentanum at fóta sær, er hendan lítla, fámenta, fjarskotna tjóðin vaksin, málið er ment, mentanin er ment og búskapurin er mentur øll árini fram til nítitalið.

Spurningurin, sum vit kunnu seta okkum, er, um hendan menningin hesi seinastu 100-150 árini síðani fríhandilin ikki júst er grundað í einum demokratiskum samanhaldi í tjóðini. At hesir 30-50.000 borgararnir úti á hesum kørgu klettum hava megnað at endurreisa føroyska málið, at byggja tað inn í skúla, kirkju og ein nógv broyttan gerandisdag. At hesi fáu fólk hava bygt upp eitt symfoniorkestur, granskarar á altjóða støði, sangarar og eina tíð høvdu eitt vinnuligt apparat, sum var høgt í metum á altjóða pallinum. Hetta hevur bert verið møguligt, tí tjóðin hevur staðið væl saman, havt ein brúkiligan demokratiskan arbeiðshátt, og at munurin millum tað, fólk flest høvdu til egna nýtslu, hevur ikki verið stórur.

### Samanhangsmegi - ein leið til framtíðina

Sum søgan í tátíð og nútíð er tulkað omanfyri, hevur spurningurin um hugburðurin í einum fólki er *eg*-kendur ella *vit*-kendur víst seg at vera av stórum týdningi fyri, hvussu væl eitt fólk, ein tjóð, stóð seg í mun til aðrar tjóðir í síni samtíð. Um tað var gamla athenska mentanin, athenska og makedónska hermegin ella tað er nútíðar vælferðin, hevur samanhangsmegin, tann javna inntøkan, demokrati, ábyrgd hins einstaka og frælsi verið lykilin til framburð.

Nú Føroyar aftur standa við stórum avbjóðingum fyri framman, hevur tað helst alstóran týdning fyri okkara møguleikar, at vit styrkja samanhangin í fólkinum. At vit hava skipanir, arbeiðshættir, atferð og hugburð, sum røkja fjøltáttað áhugamál, soleiðis at frægasta loysnirnar finnast og frægastu krefturnar verða brúktar til sítt endamál, uttan at falla í eina innannøringsfellu ("indavl").

Lesið Sosialin -so eru tit við!